TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Felagsinnskriving í Tórshavnar kommunalu skúlar og frítíðarskúlar skúlaárið 2004/2005

Foreldur ella verjar, ið ætla at lata barn/børn fødd fyri 1. januar 1998 í **1. flokk í Argja skúla, Venjingarskúlanum, Tórshavnar Kommunuskúla, Sankta Frans skúla, Eysturskúlanum ella Hoyvíkar skúla** næsta skúlaár, verða biðin at siga frá í býráðssalinum 26. ella 27. januar 2004.

**Innskrivingin**
í allar skúlarnar er í býráðssalinum **mánadagin 26. og týsdagin 27. januar, báðar dagarnar frá kl. 15-18. Havið dópsnavnabræv við.**
Mentamáladeildin skipar fyri einari felagsinnskriving. Pláss er ikki fyri øllum teimum næmingunum, sum búgva næst við ávísan skúla í býnum, tí er neyðugt at flyta næmingar í skúla, har pláss er.

**Eisini ber til at ringja**
í býráðssalin somu tíð tlf. 254010

**Skúlaumbøn**
Tað ber til at biðja um at fáa barn/ børn í ein av skúlunum. Mentamáladeildin fer saman við skúlastjóranum at kanna eftir, um tað er gjørligt, sum plássviðurskiftini í skúlanum eru. Tá ið felagsinnskrivingin er liðug, fær hvør skúli boð um, hvørjir næmingar skulu koma í 1. Flokk.

**Hoyvíkar skúli**
Næmingar í Hoyvíkar skúla fara í skúla kl. 11.50, men kunnu fara í Frítíðarskúla fyrrapart.

**Kollafjarðar skúli**
Innskrivingin í Kollafjarðar skúla er í skúlanum **mánadagin 26. januar kl. 16 seinnapartin.** Børn, ið skulu í Frítíðarskúlan, kunnu verða innskrivað í skúlanum somu tíð, sum innskrivingin er.

**Kaldbaks skúli**
Innskrivingin í Kaldbaks skúla er í skúlanum ella á tlf. 317845.

**Frítíðarskúlin**
Børn, ið skulu í Frítíðarskúlan, kunnu verða innskrivað í býráðssalinum somu tíð, sum felagsinnskrivingin er. Eisini fáast umsóknarbløð til Frítíðarskúlan í Snarskivuni, heimasíðu kommununnar (www.torshavn.fo) ella á tlf. 315160.

**Meiri fæst at vita**
um innskrivingina í skúlunum ella í mentamáladeildini, Jákupi Simonsen, deildarleiðara, tlf. 315160.

**Tórshavnar kommunalu skúlar og frítíðarskúlar**

Yrkisdepilin

## Til øll lærupláss

**Lønarendurgjald og ferðagjald fyri 2003**

Heitt verður á læruplássum at lata inn umsókn um endurgjald fyri løn og ferðagjald fyri 2003 skjótast til ber.

Oyðubløðini, sum verða nýtt, fáast frá Yrkisdeplinum ella kunnu heintast á okkara heimasíðu.

**Yrkisdepilin**
www.yrkisdepilin.fo

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**

## Írestandi skattur 2003 og AM-gjald 2003

Freistin til at gjalda írestandi skatt og írestandi AM-gjald fyri skattaárið 2003 er 31. januar. Um goldið verður í seinasta lagi hendan dagin, slepst undar eykagjaldinum upp á 4%.

Útrokningarforrit er at finna á heimasíðu stovnsins www.tollskatt.fo

Eisini ber til at rokna írestandi skattin út í bóklinginum "Skatturin 2003", ið bleiv borin út til øll húski í desember.

Tá skatturin verður goldin, skal viðmerkjast: p-tal og "Skattur 2003".

Argir, 15. januar 2004

**Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið**

## Bátur og skúrur v/ frystarí til sølu

Um hóskandi boð fæst, verða báturin m/s Báran FD865 og ein skúrur við tilhoyrandi frystarí, ið stendur á leigaðum øki á kaiøkinum í Fuglafirði, seld.

Talan er um ein 28 fót Scania Plast bygdur í 1988. Báturin hevur 60 hk Mitsubishi motor frá ársskiftinum 1991/92. Báturin verður seldur við útgerð og línu- og snellureiðskapi. Báturin hevur fiskiloyvi í bólki 5A við loyvi at reka húkaveiðu á føroysku landleiðunum.

Áhugað kunnu venda sær til:

**Advokatfelagið**
Yviri við Strond 4 · Boks 359
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 · Fax 311261

Tórmóður Djurhuus, adv. — Dánjal Magnussen, adv.
Jógvan Páll Lassen, adv. — Petur Even Djurhuus, adv.
Jógvan E. Ellefsen, adv. — Anna Dam, adv.
Ingi Højgaard, adv.

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**

## Fyribilsskráseting 2004

Fyri at fyribilsskatturin kann verða rætt roknaður, mugu tær upplýsingar, ið Toll- og Skattstova Føroya hevur skrásett um B-inntøkur og frádráttir, vera rættar.

**B-inntøkur**
Skatturin í 2004 verður roknaður út frá upplýsingunum um B-inntøku á sjálvuppgávuni 2002

Um ein B-inntøka er broytt í 2003, verða broytingarnar tiknar við í fyribilsskattaskránna 2004.

Upplýsingar um B-inntøkur eru upplýstar á kontoavritinum, sum bleiv sent út fyrst í januar 2004.

B-skattur, ið ikki er goldin, áðrenn gjaldsfreistin er úti, verður renturoknaður við 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjaldsdegi.

**Frádráttir**
Neyðugt er hjá øllum, ið ynskja møguligar frádráttir roknaðar við, at upplýsa Toll- og Skattstovuni um, hvørjar frádráttir tey hava.

**DIS-skipanin**
Persónar, sum fara at sigla undir DIS-skipanini, **og persónar, sum eru undir DIS-skipanini, men ikki hava boðað frá hesum**, eiga at boða Toll- og Skattstovuni frá, so upplýsingarnar, ið verða skrásettar fyri 2004, eru rættar.

**Rættingar/fráboðanir**
Oyðublað til at rætta ella skráseta B-inntøku, boða frá frádráttum ella sigling undir DIS-skipanini fáast á Toll- og Skattstovuni, í peningastovnum og á posthúsum.

Oyðublaðið kann eisini heintast á heimasíðuni hjá Toll- og Skattstovuni: www.tollskatt.fo

Øll eru vælkomin á økisskrivstovurnar hjá Toll- og Skattstovuni at fáa upplýsingar um, hvørjar skrásetingar um teirra skattaviðurskifti, Toll- og Skattstovan hevur.

Argir, 15. januar 2004

**Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið**









RIO · BRAVO RESTAURANT

frá sunnudegi til hósdag í januar

Two for one

BÓNDASTEAK
ENSKUR BÚFFUR
FRANSKUR BÚFFUR
TOURNEDOS
HAWAII-STEAK
T-BONE STEAK
PIPARBÚFFUR
RIO BRAVO STEAK

*Ikki galdandi fyri mat-út-úr-húsinum!*

***Eigaraskifti....***
***...og vit bjóða:***

***Etið tvey gjaldi fyri ein!***

***Galdandi fyri allar nevndu búffar og steaks!***

***Vælgagnist og gott nýggjár!***

Two for one

RIO · BRAVO RESTAURANT

BILSKROKK




***Lakkering & Plátuverkstaður***

Vit hjálpa fólki við bilskaðum/ tryggingarskaðum, lakkering, buglum, rusti og mangt annað.

Ring til okkum og fá eitt gott tilboð.

**- Tlf. 32 24 71 -**

Slættanesgøta 9 - boks 2227 - Fo-110 Tórshavn